Sosialurin 341800

# Heystfundur

Verður á Hotel Hafnia,
leygardagin
6. november 2010 kl. 9.30

Sambandsflokkurin

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Tímalærari í samskifti á Føroyamálsdeildini

*Føroyamálsdeildin søkir eftir tímalærara í samskifti á støðisnáminum í tíðarskeiðinum januar-desember 2011.*

Undirvísingin er tveir tímar um vikuna, tilsamans 2 x 30 tímar. Lærugreinin viðger fjølmiðlar ástøðiliga, søguliga og greinandi.

Løn sambært Akademikarafelagnum.

Við umsóknum skal fylgja avrit av viðkomandi prógvum og upplýsingar um starvsroyndir. **Umsóknir mugu vera Føroyamálsdeildini í hendi 15. november 2010.**

Nærri fæst at vita við at venda sær til Turið Sigurðardóttur, dekan, teldupostadr.: turids@setur.fo

FØROYAMÁLSDEILDIN
Fróðskaparsetur Føroya
V.U. Hammershaimbs gøtu 16 · 100 Tórshavn
tlf. 35 25 20

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Professari, lektari ella adjunktur í kunningartøkni

Treytað av játtan á fíggjarlógini fyri 2011 er eitt undirvísingar- og granskingarstarv í kunningar- og samskiftistøkni leyst at søkja á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Umsøkjarar skulu hava professionellar starvsroyndir á einum ella fleiri av hesum økjum: forritanar verkfrøði (software engineering), teldufrøði (computer science), telduverkfrøði (computer engineering) og skipanarmenning (system development).

Starvið verður professara-, lektara- ella adjunktstarv, treytað av førleika umsøkjarans.

Sí starvslýsingina á www.nvd.fo. Miðað verður eftir, at starvið verður sett frá 1. januar 2011 ella skjótast gjørligt eftir tað. **Umsóknarfreistin er 1. desember 2010.**

FRÓ□SKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Elektrikari



**SEV sóknast eftir einum dugnaligum elektrikara at byrja 1. januar 2011 á Innleggingardeildini.**

Innleggingardeildin hevur um hendi eftirlit og skráseting av nýggjum elinnleggingum, uppsetan og viðlíkahald av elmáti-útgerð kring alt landið. Deildin tekur sær eisini av at uppbyggja og umsita eina fjaravlestraskipan. Á innleggingardeildini starvast í løtuni 7 fólk umframt deildarleiðaran.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, verður settur í fast starv hjá SEV og fer fyrst og fremst at arbeiða á Innleggingardeildini við at dagføra kWh mátianlegg og at seta mátiútgerð upp á transformarastøðum kring alt landið.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava prógv sum elektrikari, koyrikort til vanligan bil og hava starvsroyndir og góðan kunnleika til økið.

Vit vænta, at umsøkjarar hava góð evni at samskifta og samstarva, at teir eru nærlagdir og fyrikomandi, og vanir at arbeiða við teldu. Talan er um eitt sera sjálvstøðugt starv, sum krevur at tú er uppsøkjandi og førur fyri sjálvur at leggja arbeiðið tilrættis.

**Arbeiðstíð**
Vanliga arbeiðstíðin er frá kl. 8 til kl. 17, men roknast má við, at nakað av arbeiði er uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, og má umsøkjarin hava umstøður til tað.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Handverkarafelag/-Landsfelag Handverkaranna fyri montørar, stigini 1 til 7. Byrjunar- og endalønin eru í løtuni netto ávikavíst kr. 22.007,95 og kr. 23.457,42 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi ávikavíst kr. 3.301,19 og kr. 3.518,61 um mánaðin.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin er mánadagin 22. november 2010.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Dánial Jógvan Hansson, leiðara á Innleggingardeildini á telefon nr. 346800.

SEV

# Maskinmeistari



**SEV sóknast eftir einum dugnaligum maskinmeistara at byrja skjótast til ber á elverkinum á Strond í Klaksvík.**

Elverkið á Strond hevur um hendi rakstur og hald av sjálvum elverkinum á Strond, viðlíkahald av mobilaggregatum eins og viðlíkahald av teimum fimm smáverkunum á Fugloynni, í Mykinesi, á Skúvoynni, í Koltri og á Stóru Dímun, ið tilsamans hava 14 framleiðslueindir. Hartil eru 3 eykaverk, sum eisini hoyra til starvsøkið. Á elverkinum á Strond starvast í løtuni 2 fólk umframt verkmeistaran.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, verður settur í fast starv hjá SEV og fer fyrst og fremt at arbeiða á elverkinum við Strond, og út frá hesum arbeiðisstaði til hini elverkini eftir tørvi. Talan er fyrst og fremst um dagarbeiði, men talan kann blíva um nakað av vaktararbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Førleikakrøv**
Tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.e. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir á økinum ella á líknandi øki.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið. Starvið er flokkað í lønarflokki 12. Byrjunar- og endalønin í 12. lønarflokki er í løtuni netto ávikavíst kr. 28.686,33 og kr. 29.898,81 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavíst kr. 3.872,65 og kr. 4.036,34 um mánaðin.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá prógvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin er mikudagin 10. november 2010.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Jákup Petersen, verksmeistara ella til Anders Nedergaard-Hansen, leiðara á Framleiðsludeildini, báðir á telefon nr. 346800.

SEV

Sosialurin
www.sosialurin.fo